# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# BALSLEV 100 ár

**Í sambandi við at Balsev í Hoyvík fyllir hundrað ár, verður stór móttøka á økinum hjá fyritøkuni leygardagin 19. august**



*Balslev á Eystaru bryggju*

TÍÐINDASKRIV

1906 stovnaðu tveir ungir menn umboðsvirkið, Balslev og Goos, í Keypmannahavn. Goos fór til Føroyar og Íslands fyri at knýta handilssambond, og millum annað grundløgdu teir á Siglufirði Íslands fyrstu sildaolju verksmiðju.

Hugsan teirra var at stovna eitt firma nakað sum Østasiatisk Kompagni og Det Baltiske Kompagni, um ikki so stórt sum tey. Virksemið skuldi serliga vera í teimum norðuratlantisku londunum. Hetta gjørdist so við og við til stórt og heldur fløkt handilsvirksemi, sum fyri ein part mátti lúta fyri tí stóru niðurgangstíð, ið kom aftan á fyrra heimskríggj.

Hetta var støðan, tá ið Jørgensen, stjóri, í 1927 varð sendur til Føroyar at lata deild upp her. Tað varð byrjað í smáum, í einum høli á Hotel Thorshavn. Seinni fingu vit hølir í Vágsbotni, har vit vóru til mitt í 30-unum, tá ið stórur goymslu og skrivstovu-bygningur varð bygdur á tí nýggju bryggjuni við Eystaru vág. Virksemið øktist nógv hesi árini við heilsølu, kol- og timburhandli, og seinni legðist virksemi í samband við fiskiskap aftrat.

Saman við A.P. Møller rak felagið tvær fransaskonnartir, Maritè og Lieutenent Vedrines, umframt trý smærri skip, so tað var mangur sjómaður, ið fekk avrokning á skrivstovuni hjá Balslev hesi árini. Onkuntíð í 50-unum bleiv reiðaravirksemið selt frá, og seinast í 60-unum bleiv heilsølan eisini seld, tí at leiðslan helt, at tað var neyðugt at laga seg eftir teimum stóru samfelagsbroytingum, ið stóðu fyri durum.

Í 1979 flutti timburhandilin niðan til Hoyvíkar í ein 3000 fermetrar stóran bygning á einum 10.000 fermetra stórum øki. Seinni, í 1989, lat á sama stað Føroya fyrsta byggibúð upp við 1.500 fermetrum. Síðani er støðugt útbygt, soleiðis at umstøðurnar í dag eru framúr góðar á í alt 25.000 fermetrum, harav 6.500 eru undir taki.

Á nýggjasta økinum, ið er tikið í nýtslu í summar, er ætlanin at hava bingjupláss og goymslu av betonvørum o.ø.. Í tí sambandi er ein nýggjur trukkur keyptur, serliga til bingjur, og kemur hetta at lætta munandi um, soleiðis at Balslev til eina og hvørja tíð kann nøkta allan tørv á byggitilfari. At alt er á sama stað gevur stórar fyrimunir fyri kundarnar, umframt at starvsfólkið skjótt og greitt kann avgreiða allar ordrar.

Balslev, sum í dag ger seg galdandi sum eitt sera tíðarhóskandi og leiðandi virkið á sínum vinnuøki, gevur arbeiði til 40-45 fólk (heiltíðarstørv), og komandi miðvísar íløgur fara framhaldandi at tryggja felagnum eina sterka støðu í føroyskari byggivinnu.

Í sambandi við 100 ára dagin, verður stór móttøka á økinum hjá Balslev leygardagin 19. august frá kl. 14.00 til 18.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.



*Loftmynd av Balslev í Hoyvík*



*Gomul mynd av skrivstovuni hjá Balslev á Eystaru bryggju*